

*20 ára gamla Unn Baldursdóttir úr Klaksvík hevur í fleiri ár gjørt síni egnu klæði*
*Mynd: Jonhard Hammer*

# Ger síni egnu klæði

**Til eina mótasýning á handilsskúlanum á Kambsdali gekk 20 ára gamla Unn Baldursdóttir í klæðum, sum hon sjálv hevur gjørt. Tað er nakað, sum Unn dámar avbera væl, og hon hevur ætlanir um at fara á sniðgevaraskúla, sigur hon**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Unn Baldursdóttir hevur havt áhuga fyri seyming, síðani hon var smágenta. Hon minnist aftur á, at hon plagdi at sita upp yvir langommu sínari, meðan hon seymaði. Langomma Unn var tiltikin dugnalig at seyma.

– Eg minnist, at eg plagdi at gleða meg til eg bleiv størri, so kundi langomma læra meg at seyma, greiðir Unn frá.

Hon seymar ikki nógv fyri onnur, men tað hevði hon væl kunnað hugsað sær. Tað er bara ikki vorðið til tað enn. Og tann stóra framtíðar ætlanin er, at hon skal fara á sniðgevara skúla. Tað skal helst vera onkra aðrastaðni enn í Danmark.

### Alt er móti

Tá prátið fellur inn á móta, hevur Unn greiða meining um, hvat tað er fyri nakað. Hon heldur, at mótin í dag er fínur, tí alt er loyvt.

– Mær dámar væl 60´ 70´og 80´ ara mótan, og ein sær eitt sindur av øllum aftur í dag. Kanska serliga mótin úr 80´unum er á veg fram aftur, so hann er serstakliga spennandi, sigur hon.

Unn seymar ikki øll síni klæði. Hon keypir eisini ofta klæði til sín sjálvs. Men sjálv sigur hon, at hon kennir seg betur í klæðum, sum hon sjálv hevur seymað. Stílurin hjá Unn er nakað "flipputur", sum onkur vildi sagt, við løgnum samansetingum í litum, sniði og so framvegis. Men henni klæðir tað, og hon kennir seg væl í teimum.

Hon sigur, at hon ofta hevur fingið skotið í skógvarnar, at tað ikki er føstulávint, tá hon skal ein túr í býin ella okkurt annað serstakt, har hon sjálv hevur gjørt sær eitt sett at fara í.

### MTV

Unn veit væl, at hennara stílur er serstakur, og at summi undrast á hann. Men haraftur ímóti, so rennur hon seg sjáldan í persónar, sum eru í líka klæðum sum hon.

Serliga í fyrstuni, tá hon byrjaði at seyma klæðir, fekk sín íblástur frá MTV.

- Har er altíð okkurt smart og annaðleiðis at heinta, sigur hon við einum smíli.

Unn vil fegin læra meira innan sniðgeving, tí hon heldur seg ikki duga nóg væl at tekna mynstur og annað. Og tað er tað, sum hon vil læra nú, tí hon heldur, at tá tað kemur til sjálva seymingina, hevur hon grundina.

– Grundarlagið við at tekna og sniðgeva manglar mær, og sum eg havi skilt, so er tað eitt krav fyri at kunna koma inn á skúla, so tað verði eg noydd at gera meira við, um eg skal gera mær nakrar tankar um at koma inn á skúla, sigur hon.

### Eingangsklæði

Unn sigur, at klæðini, sum hon seymar aloftast eru eingangsklæði. Tað vil siga, at hon sjáldan fer í tey fleiri ferðir.

– Tá eg skal okkurt, seymi eg til mín sjálvs, ístaðin fyri at fara út at leita eftir onkrum. Men eg hyggi ofta at klæðum í handlum, fari so og keypi toy og so seymi eg okkurt líknandi sjálv við egnum sermerkjum á, sigur hon.

Unn hevur onkuntíð seymað fyri onnur, men tað er ikki nakað, sum hon hevur gjørt nógv við. Hon greiðir frá, at hon seymaði ein búna til ein tónleikara, sum skuldi framføra til Prix Føroyar.

– Tað var spennandi, eg seymaði ein indianarabúna til hansara. Og eg slapp at brúka mítt egna hugflog, so tað dámdi mær væl, sigur Unn. Men hon heldur samstundis, at mamma hennara fekk nóg mikið av øllum ta tíðina, tí alt húsið fleyt í toyið, perlum og øðrum , sum Unn nýtti til búnan.

Foreldur hennara stuðla annars Unn fult í hennara ítrivi. Tey siga, at hetta er ein gáva, sum Unn hevur fingið, og tey taka tað sum eina sjálvfylgju, at hon fær pláss og tíð til at dyrka hana.

Unn gongur á FHS á Kambsdali, og hon hevur ikki endaliga tikið avgerð, um hon fer víðari á HH ella fer at leggja seg meira eftir at røkka dreymi sínum um sniðgevaraskúla.

– Fyrst skal eg bara hava FHS afturum, so fáa vit at síggja, sigur 20 ára gamla Unn Baldursdóttir.



*Her fyri gekk Unn mótaframsýning á Handilsskúlanum á Kambsdali*
*Mynd: Jonhard Hammer*



*– Eg fái íblástur frá MTV. Har er ofta nógv smart at síggja, sigur Unn Baldursdóttir*



# Eg havi onki sæð til nakra njósning

**– Um russiskir sjómenn hava njósnast í Føroyum, veit eg ikki. Eg veit bara, at eg havi so ikki merkt nakað óvanligt, sigur Árni Dam á Skipafelagnum, sum hevur umboðað russisk skip í Føroyum í næstan 60 ár**

REYÐA BÓK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Eg havi onki sæð og onki hoyrt til nakra russiska njósning í Føroyum, sigur Árni Dam, sum umboðar russisk skip í Føroyum*

– Eg havi ongantíð verið varugur við nakað sum helst.

Ongin føroyingur hevur havt so nógv við russisk skip at gera, sum Árni Dam á Skipafelagnum.

Skipafelagið hevur umboðað russisk skip í Føroyum síðani 1947 og sjálvur hevur Árni Dam tikið sær av hesum uppgávunum síðani 1978.

Í Reyðu Bók verður róð framundir, at russisk fiskiskip Føroyum njósnaðust fyri russisku fregnartænastuna.

Hetta vóru bæði skip, sum fiskaðu undir Føroyum og skip, sum vóru á føroyskum skipasmiðjum eftir at avtala varð gjørd ímillum Føroyingar og russarar um at umvæla russisk skip í Føroyum.

Tað veit Árni Dam í hvussu so er, onki um.

Tó heldur hann fyri, at øll lond hava røkt síni egnu áhugamál og hava roynt at savna sær uplýsingar saman av ymsum slagi.

– So, hvat ið er rætt og hvat er skeivt í hesum føri, eri eg ikki førur at svara fyri.

Men Árni Dam hevur í hvussu so er ikki lagt merki til nakað og hann hevur onki, uttan alt tað besta, at bera russisku sjómonnunum.

– Eg havi ongantíð ansa eftir nøkrum sum helst løgnum. Eg havi onki sæð og onki hoyrt og ongin hevur nakrantíð spurt meg um nakað sum helst, sigur Árni Dam.

Og hann hevur heldur ikki lagt nakað annað til merkis enn tað, at russiskir fiskimenn vóru annað enn júst fiskimenn.

Tað er heldur ongin av mínum undanmonnum í hesum arbeiðnum, sum kennir nakað sum helst til nakra njósning.

Eitt, sum verður ført fram í Reyðubók, er, at lastin á onkrum av hesum fiskiskipum, hevði ongi sum helst tekin um, at fiskur hevði verið í teimum.

– Tað veit eg ikki. Men av teimum skipum, sum komu higar til umvælingar, var talan í summum førum um skip, sum høvdu ligið fyri teymi í fleiri ár, so tað var kanska ikki so undarligt, at onki sást til fisk í lastini.

### Trupuleikar eina ferð

Hann sigur, at tað hava heldur ikki verið stórvegis trupuleikar ímillum russarar og føroyingar.

– Samstarvið við russarar hevur verið ógvuliga gott, tað er tað einasta, eg kann siga um teir.

– Einastu trupulleikar, vit hava havt, var tá ið tað fyrsta skipið kom á Skála Skipasmiðju til umvælingar fyrst í áttatiárunum.

– Tá østi eitt ávíst blað (Dagblaðið, blm.) føroyingar upp ímóti russarunum og tað førdi til, at ungdómar herjaði á Skála Skipasmiðju at kasta egg og annað líkt og ólíkt, eftir russisku sjómonnunum.

– Men eftir eina grein í Sosialinum beint aftaná, helt alt tað uppat og síðani hava als ongir trupuleikar verið.

Árni Dam sigur, at føroyingar eru ógvuliga høgt í metum ímillum russarar og tað er onki fólk, sum teir meta hægri enn føroyingar.

Annars biðjur Árni Dam okkum takka føroyingum og serliga sjómanskvinnuringunum, so hjartaliga frá russisku útgerðarfeløgunum fyri allar tær stórfingnu jólagávurnar, sum russisku sjómenninir fingu til jóla.

# Hava einki ímóti at Hans Pauli steðgar á

**– Tað ger ikki so nógv, at landsstýrismaðurin hevur gjørt av at útseta ætlanina um økisterapi eitt sindur, sigur Sinnisbati, sum er felagið hjá teimum sálarsjúku**

ØKISTERAPI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit eru slett ikki til reiðar at taka ímóti nakrari økisterapi til sálarsjúk enn.

Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata, sum er felagið hjá teimum sálarsjúku, hevur ikki so nógv ímóti, at ætlanin at seta økisterapi til sálarsjúk í verk í Føroyum, er útsett eitt sindur.

Fyrr í vikuni boðaði landsstýrismaðurin í almanna og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, frá í Útvarpinum, at av tí at fíggjarliga orkan varð avmarkað, fór hann í fyrstu syftu at raðfesta sjálva grundtænastuna hjá Heimarøktini fremst. Sostatt fór ætlanin at seta økisterapi í verk kring landið, at verður útsett fyribils.

Júst økisterapi hevur verið eitt av fremstu hjartamálum hjá felagnum Sinnisbata.

Men forkvinnan í felagnum hevur kortini ikki so nógv ímóti, at drála verður á við ætlanini økisterapi.

– Veruleikin er, at tað ber slett ikki til at seta nakra økisterapi í verk sum er, sigur Soffi Egholm, forkvinnan í Sinnisbata.

### Kommunurnar ikki fyrireikaðar

Soffi Egholm sigur, at økisterapi setir stór krøv til tær ymsu kommunurnar kring landið. Men, sum støðan er nú, eru tær yvirhøvur ikki til reiðar at taka ímóti nakrari øksiterapi.

Og hon sigur, at tær fortreytirnar mugu fáast í rættlag, áðrenn nøkur økisterapi verður sett í verk.

– Tað krevjast stórar fyrireikingar at seta eina økisterapi í verk og tann fyrireikingin er ikki gjørd enn, sigur forkvinnan í Sinnisbata.

Endamálið við økisterapi er, at fólk skulu kunna fáa búgva í heumbygdini og fáa sálarliga viðgerð har, ístaðin fyri at noyðast til Havnar á sjúkrahús.

– Tað merkir sostatt at umstøður skulu gerast í heimbygdini, so at tey kunnu búgva heima og enn hava ongar kommunur gjørt seg til reiðar at taka ímóti teimum sálarsjúku.

– Eitt nú er tað neyðugt at fyrireika heimarøktina kring landið til at taka ímóti sálarsjúkum. Millum annað merkir tað, at tey, sum arbeiða í heimarøktini, skulu eftirútbúgvast, bæði fyri at hava tað fakliga í lagi og fyri at læra seg til at sínamillum samveru við sálarsjúk

Somuleiðis skulu venjingarmiðstøðir setast á stovn, har tey sálarsjúku kunnu fáa venjing í at klára seg í einum samfelag.

– Sálarsjúk, sum hava verið innløgd á sjúkrahús í longri tíð, skulu fyrireikast væl, fyri at kunna klára seg í samfelagnum. Tað eru ógvuliga nógvir smálutir, sum tey sálarsjúku skulu fyrireikast til, fyri at klára seg í samfelagnum.

– Bara tað, at fara eini ørindi á Posthúsið, krevur venjing, tí tað hava tey kanska ongantíð roynt fyrr.

– Tá ið tey hava verið innløgd, hava tey heldur ikki fingið løn og tí krevur tað eisini venjing at fara til handils og at fáa pengarnar at røkka, tí alt hetta, og nógv annað, eru viðurskifti, sum tey eru púra óvon við og tískil mugu læra.

### Goymt og gloymt

Soffi Egholm sigur, at tey sálarsjúku eru eitt øki, sum bæði hevur verið goymt og gloymt.

– Kommunurnar hava ikki raðfest økið yvirhøvur og tí eru tær als ikki til reiðar at taka ímóti nakrari økisterapi.

Men forkvinnan í Sinnisbata sigur, at nú er gongd sett á arbeiðið við økisterapi.

– Økisterapi er sett í samgonguskjalið og tí er ongin vegur aftur.

Hon sigur, at nú fer Sinnisbati at ferðast kring landið at tosa við kommunurnar um økisterapi fyri at fáa tær at seta pening av á fíggjarlógini til økið.

– Vit fara at greiða kommununum frá, at tá ið næsta fíggjarætlanin skal leggjast, er tað eitt øki sum eitur økisterapi, sum kommunurnar koma at fáa eina ábyrgd av, og sum sostatt eisini eigur at verða raðfest á fíggjarætlanini.

Samstundis fer felagið at hava fund við Hans Paula Strøm, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum um viðurskiftini.

Á hesum fundinum fara tey at tosa við landsstýrismannin um sálarfrøðiligu tilboðini og um, hvussu raðfestast eigur at vera.



*– Í løtuni er samfelagið als ikki til reiðar at skipa fyri nakrari økisterapi til sálarsjúk. Tað skulu nógvar fyrireikingar til, ikki minst úti í kommununum og tær mugu gerast fyrst, sigur Soffi Egholm, forkvinna í Sinnisbata*

Hon sigur, at í løtuni eru fíggjarligu vánirnar ikki tær bestu og tað slepst ikki undan at góðtaka.

– Men fyri tað ber tað væl til at gera tær neyðugu fyrireikingarnar, tí tað er nógv arbeiðið, sum ikki kostar so nógv.

– Og Sinnisbati fer ikki at góðtaka, at arbeiðið at seta økisterapi í verk, verður slept ella fer ov langt afturum í raðfestingini.

Soffi Egholm sigur, at sjálvsagt kostar tað pening at gera eina økisráðgeving. Men hon heldur ikki, at talan verður um tær stóru upphæddirnar, tí talan er hóast alt um lutfalsliga fá fólk og tað er ikki neyðugt at fylla eina økismenning við læknum.

– Tí eigur økismenning ikki at verða gjørd til nakað serligt. Tað átti at verið ein púra natúrligur partur av politisku raðfestingunum, tí hetta snýr seg um, at tey sálarliga sjúku í hesum landinum ikki verða gjørd ómyndug, sigur Soffi Egholm.